B36-KÍ:

# Alexander aftur úti



*Símun Joensen og Klæmint Matras fáa hvør í sínum lagi helst týðandi uppgávur í dystinum sunnudagin*

**B36 hevur ikki ráð at missa nakað móti KÍ, sum við einum sigri veruliga kann skapa sjógv niður til miðjuna**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Seinasta vikuskifti fekk B36 gongd á tað, sum frá flestum síðum hevur verið roknað av liðnum í ár. Leikluturin sum favorittur tykist annars at hava hóvað árstalsfelagnum sera illa, og í nógvum førum hava teir havt ilt við at skapa neyðugu møguleikarnar, men tað var so ikki nakar trupulleiki í Miðvági.

Spurningurin er so, hvørt stjørnurnar á liðnum kunnu halda somu taktina komandi dystirnar. Nakað sum teir meira ella minni eru noyddir til, nú teir longu eru fýra stig aftan fyri oddaliðini. Ikki minst nú eitt av hesum vitjar í Gundadali, har talan sostatt tykist vera um ein seksstiga dyst.

### Broytingar hjá KÍ

Og í mun til liðið í Miðvági verður talan helst bara um smávegis broytingar hjá B36. Fróði Clementsen, sum higartil hevur verið í miðverjuni, noyddist tá skaddur av vøllinum, og hann stóð ikki royndina, tá venjing var á skránni hóskvøldið, og tí má nýggjur maður setast í hansara stað.

Í aðrar mátar tykist talan ikki vera um stórvegis broytingar. Heini í Skorini er nú av álvara við at koma í venjing aftur skaðan, sum hann fekk í steypakappingini, og hann verður væntandi við í hópinum, men tað verður ikki lætt hjá honum at troka nakran av verandi miðvallarunum burtur eftir avrikið seinast.

Hjá KÍ tykist eitt sindur verri statt, tá talan er um broytingar. Onkur vildi kanska sagt, at hesar vóru neyðugar, tí spælið ikki hevur koyrt so væl, men hetta munnu venjari og leikarar tó leggja vertin á, so leingi sum stigini koma inn á kontina.

Tað er tó einki at ivast í, at tað er stórur missur, at Alexander Djordjevic nú aftur er skaddur. Talan er um sama liðbandsskaða, sum hann fekk móti B36 í steypakappingini, og sum tá noyddi hann at ganga á høkjum eina tíð. Týskvøldið beklaði hann undir venjing, og útlitini benda tann vegin, at talan er um júst sama skaða, og so verður hann ikki tøkur sunnudagin.

Tað verður Allan Joensen kanska heldur ikki, eftir at hann noyddist av vøllinum á Skála seinasta sunndag. Allan hevur tó vant nakað í vikuni, og tað verður í øllum førum roknað við, at hann verður við í hópinum, sum fer til Havnar.

Tað vera Jan Andreasen og Fríðin Ziskason eisini, eftir at báðir hava verið burturstaddir, so Jan Joensen hevur í øllum førum onkur nýggj alternativ at seta á vøllin, umframt at hann helst eisini sjálvur fer at lata seg í gaggurnar. So er spurningurin bara, hvørt hann verður millum teir fyrstu ellivu ella ikki.

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 22.06 | VB-HB | Suni Johansen |
| 22.06 | EB/S-KÍ | Jens Petur Brattalíð |
| 22.06 | B36-KÍ | Oddmar Andreasen |
| 22.06 | B68-FSV | Dagfinn Olsen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 21.06 | B71-Sumba | Tummas Pauli Olsen |
| 21.06 | B36-AB | Jákup M. Kjeld |
| 21.06 | ÍF-TB | Georg N. Rasmussen |
| 21.06 | VB-KÍ | Hans F. Hansen |
| 21.06 | B68-LÍF | Jón Kári Frederiksen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 22.06 | GÍ-Skála | Ove Heinesen |
| 22.06 | ÍF-FSV | Jan Gardar |
| 22.06 | B36-TB | Andrew Christiansen |
| 22.06 | EB/S-NSÍ | Eyðun Kjærbo |
| 22.06 | Royn-HB | Poul Erik Jacobsen |

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 5 | 3 - 2 - 0 | 15 | 5 | 10 | 11 |
| 2 | GÍ | 6 | 3 - 2 - 1 | 10 | 6 | 4 | 11 |
| 3 | KÍ | 5 | 3 - 2 - 0 | 6 | 2 | 4 | 11 |
| 4 | NSÍ | 5 | 2 - 3 - 0 | 10 | 4 | 6 | 9 |
| 5 | B68 | 5 | 2 - 3 - 0 | 5 | 3 | 2 | 9 |
| 6 | B36 | 5 | 2 - 1 - 2 | 6 | 5 | 1 | 7 |
| 7 | EB/Streymur | 5 | 1 - 2 - 2 | 6 | 10 | -4 | 5 |
| 8 | FS V | 5 | 1 - 1 - 3 | 7 | 12 | -5 | 4 |
| 9 | VB | 5 | 0 - 2 - 3 | 4 | 12 | -8 | 2 |
| 10 | Skála | 6 | 0 - 0 - 6 | 1 | 11 | -10 | 0 |

**Støðan, 2. deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 5 | 5 - 0 - 0 | 11 | 2 | 9 | 15 |
| 2 | Sumba | 5 | 3 - 1 - 1 | 13 | 3 | 10 | 10 |
| 3 | AB | 5 | 3 - 1 - 1 | 12 | 5 | 7 | 10 |
| 4 | TB | 5 | 3 - 1 - 1 | 12 | 6 | 6 | 10 |
| 5 | VB | 5 | 2 - 1 - 2 | 6 | 5 | 1 | 7 |
| 6 | LÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 5 | 13 | -8 | 6 |
| 7 | KÍ | 5 | 2 - 0 - 3 | 9 | 19 | -10 | 6 |
| 8 | B36 | 5 | 1 - 1 - 3 | 7 | 9 | -2 | 4 |
| 9 | B71 | 5 | 1 - 0 - 4 | 2 | 7 | -5 | 3 |
| 10 | B68 | 5 | 0 - 1 - 4 | 4 | 12 | -8 | 1 |

# Tølini tala

| | '02 | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| GÍ-Skála *) | 2-1 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-0 | 2-1 |
| VB-HB | 0-0 | 2-0 | 0-0 | 1-0 | 1-1 | 1-1 | 1-0 | 1-1 | - | 2-1 | 4-6-0 | 9-4 |
| EB/S-NSÍ | 1-2 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 2-1 | - | 2-0-1 | 4-3 |
| B36-KÍ | 3-3 | 5-0 | 1-2 | 2-0 | 3-2 | 2-1 | 1-1 | 2-1 | 0-4 | 0-1 | 5-2-3 | 19-15 |
| B68-FSV | - | 5-1 | 2-0 | - | - | 5-1 | 2-1 | 5-0 | - | - | 5-0-0 | 19-3 |

*) dysturin millum GÍ og Skála varð framskundaður, og vann GÍ ta ferðina við somu tølum, sum í 2002.

Tað er sjálvandi einki avgjørt, fyrr enn dómarin hevur bríkslað fyri seinastu ferð í teimum fýra landskappingardystunum, sum verða leiktir um vikuskiftið. Men tað skerst ikki burtur, at tað ofta verður tikið til, hvussu tað plagar at hilnast, tá ymsu liðini vitjað hjá øðrum feløgum.

Eitt nú kann staðfestast, at HB hevur havt tað sera trupult í Vági, har tað ongan tíð er eydnast at fáa fult seinastu tíggju árini. Hinvegin kann B68 styðja seg til, at tað hvørja ferð hevur eydnast teimum at halda alt heima, tá FS Vágar hava vitjað, og í fleiri førum hevur talan verið um sera sannførandi sigrar.

Talvan her á síðuni sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum í landskappingini seinastu tíggju árini.

**- jm**



B68-FS Vágar:

# Nú er aftur stuttligt á Toftum

**Við einum sigri sunnudagin kann B68 lyfta seg heilt fram í oddin, og tað var so ikki tað, sum tókist mest nærliggjandi undan kappingarárinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Toftamenn hava higartil í ár tikið nógv á bóli, og við einum sigri sunnudagin kann liðið førka seg upp í avgjørda oddin*

Undan kappingini varð sagt av Toftum, at nú skuldi eitt nýtt lið byggjast upp við lokalum kreftum, og tað tí ikki varð hugsað so nógv um støðuna á talvuni í ár, sum tað annars hevur verið gjørt seinnu árini.

Eftir fimm umfør er boðskapurin kanska hin sami, men tað skerst ikki burtur, at spenningurin á Toftum er nakað vaksin, so hvørt sum stigini er komin inn á kontina.

Sunnudagin fær B68 vitjan av FS Vágum, og um øll stigini fáast frá uppflytarunum, er B68 av álvara at rokna millum oddaliðini, tá fyrsti triðingurin av kappingini er farin aftur um bak.

Viðvíkjandi fólki veðrur sagt av Toftum, at har er einasti ivamálið Øssur Jacobsen sum hevur trupulleikar við knænum. Leikbann hava teir ikki kent sviðan av enn, so tað er neyvan hugsandi, at talan verður um tær heilt stóru broytingarnar á liðnum.

Hjá FS Vágum verður kanska heldur ikki talan um nakra kollvelting eftir greiða tapið seinasta vikuskiftið, men har eru leikbann so smátt við at gera um seg.

Seinasta vikuskifti fekk Ruslan Scrilea ikki verið við, tí hann hevði sæð ostaskorpuna hjá dómarанum. Hann er nú tøkur aftur, men Bjarni Prior hevur trý gul kort á kontini og fær tí ikki verið við.

Ari Thomassen hevur verið burturstaddur hesa vikuna og hevur tískil ikki fingið vant, men hann skuldi koma aftur til landið leygardagin, so roknað verður við, at hann verður tøkur hjá venjaranum. Tað verður Rói Árting helst eisini, eftir at hann var úti við skaða seinast.

Og so eru kanska útlit fyri, at vágamenn fáa styrkt hópin nakað í næstum. Jógvan Hendrik Samuelsen, sum annars hevur verið búsitandi í Danmark seinnu árini, flytir nú heim aftur, og spurningurin er so, hvørt hann longu nú verður partur av liðnum, ella um hetta má bíða nakrar vikur. Týdningurin av dystinum er í øllum førum stórur, tí við einum sigri her kunnu vágamenn førka seg væl burtur frá niðurflytingarstrikuni, soleiðis sum málið varð sagt at vera undan kappingarárinum.

VB-HB:

# HB vil broyta hagtølini



*HB hevur aloftast havt tað sera strævið í Vági, har seinasti sigurin í landskappingini er 12 ára gamal*

**HB hevur ikki vunnið í Vági síðani 1991, men vónin er, at hesi hagtøl verða broytt sunnudagin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá VB hetta kappingarárið. Higartil eru bert tvey stig fingin á kontina, og skal niðurflytingarspøkilsið ikki av álvara gera um seg, er kravið, at nøkur stig fáast til høldar heilt skjótt.

Og útlitini fyri hesum tykjast góð sunnudagin. Gaman í er HB oddalið í landskappingini, men júst í Vági hevur HB seinastu nógvu árini tað so trupult, sum onga aðrastaðni. Ikki síðani 1991 hevur HB fingið alt við sær úr Vági, og tó at dystirnir mangan hava verið tættir, so hevur eydnan ikki verið við havnarmonnunum.

Og í Vági kunnu tey eisini fegnast um, at besta VB-liðið loksins kann fara fullmannað á vøllin. Mest sum allar hinar dystirnar hevur okkurt leikbannið gjørt um seg, og tá hetta ikki var støðan seinasta vikuskifti, var Eyðun Joensen burturstaddur. Hesa ferð tykjast tó allir mans at vera tøkir, og so er spurningurin bara, hvørt tað eydnast at halda fast í góðu hagtølunum.

Tað vóna vágbingar sjálvandi fer at bera til, men hjá HB er støaðn eitt sindur øðrvísi. Liðið er aftur í ár at finna har frammi, sum tað er stuttligt at vera, og tí vildu trý stig í Vági verið sera kærkomin. Ikki minst nú talan er um eina hampuliga trupla dystarskrá við útidystum í Vági og á Toftum, áðrenn grannauppgerðin verður í Havn.

At HB yvirhøvur er so væl fyri nú, kann tykjast eitt sindur óvæntað. Í fyrsta lagi tí fleiri av teimum, sum í fjør vunnu FM, ikki eru á liðnum longur, og harnæst tí HB higartil hevur verið rættiliga meint rakt av skaðum.

Seinast var tað Rúni Nolsøe, sum mátti geva skarvin yvir, og hóskvøldið var framvegis ivasamt, um hann fekk verið við í Vági. Jan Dam, Nico Dugaru og Kári Nielsen eru framvegis úti við skaða, og á miðvøllinum er Martin Christiansen eisini skaddur í lærkrikanum, men roknað verður tó við, at hann bítur pínuna í seg nøkur umfør afturat. Eisini hin danin á liðnum, Karsten From, hevur onkran smáskaða, men tó at hann ikki hevur vant við fullari ferð alla vikuna, so varð tó roknað við, at hann fór við Smyrli til Vágs.

EB/Streymur-NSÍ:

# Heimaliðið skal reisa seg

**Hjá Runavíkingum ræður um at hanga í oddinum, meðan EB/Streymur hinvegin helst vil sleppa púra leyst av botninum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



*Runavíkingar hava havt nógv at fegnast um higartil í ár, og á Eiði verður farið eftir øllum stigunum*

Tað er ikki sørt, at seinsti sunnudagur mundi kennast heldur tungur hjá EB/Streymi. Í hálvan tíma høvdu teir meistararnar úr HB væl og virðiliga á knøunum, men tað endaði meira ella minni við sorli, tá HB brádliga koppaði øllum.

Tí ræður kanska fyrst og fremst um at reisa seg sálarliga hetta vikuskiftið, tá NSÍ kemur á vitjan, men nøkur løtt uppgáva verður tað so ikki.

Runavíkingar hava í ár hildið fram har, sum teir sleptu í fjør, og ábendingar hava til tíðir verið um, at silvurið frá í fjør helst skal betrast, og tí er ein sigur nærum eitt krav hjá teimum, nú teir vitja á Eiði.

Heimaliðið hevur mest sum allar leikarar tøkar. Einasta undantakið er Andrzej Pacek, sum neyvan verður tøkur hesumegin summarsteðgin, men í aðrar mátar tykjast allir mans tøkir.

Júst saknurin í Pacek hevur annars verið stórur, nú ein nýggj miðverja skal spælast saman, men í Egil á Bø hevur EB/Streymur í øllum førum leikaran, sum kann binda hesa saman.

Júst ein sterk miðverja má sigast at vera ein fortreyt móti runavíkingum, sum fyri tað mesta hava ført álopini oman eftir kantunum, fyri síðani at senda innfyri, men hetta vápnið verður tó nakað skert sunnudagin.

Kviki vongurin, Jónstein Petersen, er nevnliga leikbannaður, nú hann longu hevur fingið trý gul kort, og tí mugu runavíkingar finna onkran annan leikara at taka djúpu renningarnar í borðinum.

Í aðrar mátar tykjast allir leikarar tøkir til vikuskiftið. Christian Høgni Jacobsen fór út við skaða seinast, men hesin var helst ikki álvarsamur, sum vandi tóktist vera fyri, og eisini Kári Hansen hevur vant við fullari ferð alla vikuna, eftir at hann mest sum ikki hevur verið við í ár vegna trupulleikar við rygginum.

So er bert eftir hjá Jógvan Martin Olsen at finna røttu samansetingina á liðnum til sunnudagin, men bara hetta kann í sjálvum sær gerast torført, tá úrvalið av møguligum leikarum er somikið stórt, sum tað í løtuni tykist vera hjá NSÍ.